Oljan gevur arbeiði:

2000 fólk arbeiða á Sullom Voe



Vælstandurin spírar allastaðni kring oljuhavnina í Hetlandi. Bygdir, sum nærum vóru avtoftaðar, blóma nú aftur og »oilmoney«, oljupengarnir, síggjast aftur allastaðni í hetlendska samfelagnum

Eftir
Jústinus Eidesgaard

Sullom Voe (Tíðindablaðið Sosialurin): Tosa hetlendingar um olju, so tosa teir um Sullom Voe, kemur pratið inn á olju, og tað er rættuliga vanligt í Hetlandi, so gongur ikki drúgv tíð, áðrenn navnið Sullom Voe verður nevnt. Og tað er heldur ikki so løgið, tí samanlagt búgva ikki meir enn 20.000 fólk í Hetlandi og bara í Sullom Voe arbeiða 2000 fólk. Nógv tann størsti parturin av hesum búgva í Hetlandi.

Sullom Voe er ein vág ella ein fjørður, sum gongur inn av Yell-sundinum og hetta er ein rættuliga rúmligur fjørður, her er gott pláss, men tað er eisini neyðugt, tí risastór tangaskip eru dagligir gestir á fjørðinum og tey leggja at heilt inni á botni. Størsta skip, sum hevur verið á Sullom Voe, tók 420.000 tons av olju.

Føroyska ferðalagið, sum kannar oljuvinnuna í Hetlandi í hesum døgum, vitjaði í Sullom Voe hósdagin. Vit fóru tíðliga avstað um morgunin og vit koyrdu niður eftir heiðunum á høvuðsoynni Mainland. Allastaðni vóru fólk burturi í torvi. Torvluturnir løgu skyggjandi í sólini. Torvskurður er enn vanligur í Hetlandi og hetta kemst av, at hetta er ókeypis brenni og hetlendingar eiga ovmikið av torvi. Berið, har teir skóru, var mansthædd høgt í støðum skoru teir í trimum løgum niður eftir í støðum. At hentlendingar skera torv samstundis sum 800.000 tunnur av olju hvønn einasta dag streyma inn í Sullom Voe, kann tykjast eitt sindur bakvent, men sum ein hetlendingur segði við okkum: »Torvið gevur okkum hita og hjartastyrk, tá vit skera tað og tað hitar okkum eisini í vetur, [illegible] er tað ókeypis.«

Stór havn

Tann fyrsti, vit vitja í Sullom Voe, er havnarmeistarin og hann eitur Keith J. Radley og er ein myndugur maður. Hann hevur ábyrgdina av, at alt gongur rætt fyri seg í havnini og tað er m.a. hann, sum tekur avgerð um eitt skip sleppur inn ella ikki og hann er eisini samskiparin, skuldi tað hent, at olja lak út.

– Hetland lá næst stóru oljuøkjunum í Norðsjónum, tí varð oljuhavnin her gjørd. Í fyrstuni vildu øll tey stóru feløgini hava hvør sín terminal, men hetlendingar mótmæltu og tað endaði við, at ein stórur terminalur varð bygdur til øll feløgini. Í dag eiga 43 oljufeløg Sullom Voe og BP rekur terminalin fyri øll hini feløgini, segði Keith J. Radley.

Tvey oljurør, pipeline, ganga úr Norðsjónum til terminalin og framleiðslan er eitt sindur upp og niður. Miðskeiðis í áttatiárunum streymaðu hvønn einasta dag 1,5 milliónir tunnur gjøgnum rørini. Nú er framleiðslan minni á 800.000 tunnum dagliga.

Dálking

Vit hava ábyrgdina av havnini og lóðsunum. Skuldi olja lekið út á sjógv, so mugu oljufeløgini sjálvi rudda upp eftir sær og tey sleppa ikki at gevast fyrr enn vit eru nøgdir. Men vit hava ikki verið nógv plagaðir av dálking, ið hvussu er ikki nakrari størri dálking sum við Braer. Talan hevur verið um smærri lekar, tann størsti 1100 tons, sigur Keith J. Radley.

Tað hendir av og á, at olja lekur á sjógv og higartil hevur tað verið talan um mekaniskar ella mannateil- [illegible] Tað er enn ongantíð komið fyri, at vit hava havt feilin, men vit eru fyrireikaðir upp á, at tað ringasta skal henda. Oljufeløgini her hava risastóra útgerð at taka olju upp við, skuldi eitt óhapp hent. Tó alla oljuna fáa vit ikki uppaftur, fara 100 tons í havnina, so fáa vit 60 uppaftur, restin hvørvur í

Framhald á síðu 6

Hittu nólsoying í Sullom Voe

Langabbin, sum var nólsoyingur, rak til Hetlands og búsettist har. Gordon Walterson er ein av eftirkomarunum

Eftir
Jústinus Eidesgaard

Sullom Voe (Tíðindablaðið Sosialurin): Føroyingar eru sum havhesturin, teir rekast allastaðni, verður mangan tikið til og nakað er í tí. Tað er neyvan tað land til í heiminum av týdningi, har ikki ongur føroyingur býr. Hósdagin hitti føroyska ferðalagið, sum er í Hetlandi í løtuni og hyggur at oljuvinnuni, ein føroying í Sullom Voe, ein tann størsta oljuhavnin í Europa. At vit hittust var av reinari tilvild.

Føroyingurin eitur Gordon Walterson, og verður kallaður Kaptein Walterson, hann kennir seg eisini sum føroying, hóast hann er føddur og uppvaksin í Hetlandi og dugir ikki at tosa føroyskt.

Hetta ljóðar sum ein ævintýrsøga, men langabbi hansara, sum var nólsoyingur, rak einaferð á útróðri saman við einum øðrum nólsoyingi niður til Hetlands, illveður kom á teir. [illegible] hava ikki havnað á langabbanum, men kanska verður møguleiki at kanna hesa søgu eitt sindur betur, tá vit koma heimaftur.

Teir báðir nólsoyingarnir verða væl móttiknir í Hetlandi og hesin eini, langabbi Kaptein Waltersons, hittir eina gentu, sum hann gerst góður við og tað endar við, at tey bæði giftast. Tey fáa síðan børn og eftirkomarar teirra liva enn í Hetlandi.

Kaptein Walterson hevur nakrar ferðir verið og vitjað í Føroyum, úti í Nólsoy. Ein av skyldmonnunum er Arinn Poulsen, keypmaður í Nólsoy.

Vit høvdu [illegible] at henda dagin, vit hittust, [illegible] ikki [illegible] góðar stundir at práta. Henda dagin hevði hann luttikið í eini [illegible] í Sullom Voe. Leysligametir [illegible] Kaptein Walterson einastaðni [illegible] í sekstiárunum til aktars.

Hetlendingurin Gordon Walterson, ið starvast á Sullom Voe, er [illegible]. Hann hevur fleiri ferðir vitjað í Nólsoy, og ein [illegible] hansara er Arinn Poulsen keypmaður [illegible]

Savnsmynd: Kalmar Landenskov

Jústinus Eidesgaard úr Hetlandi